# **Frank Davidsen:** Pápi hansara

Frank er eitt av teimum mongu »eingilskmannabørnum«, sum hevur fingið samband við sína ensku ætt. Pápi hansara varð bumbaður tríggjar ferðir. Hann var skipari á Lincoln City, sum varð søkt á Havnarvág í 1941



*Frank Davidsen fann sín uppruna*



*Pápi Frank Davidsen í 1939*



*20 ára gamal setur Frank seg í samband við pápa sín*



*Pápi Frank, Francis Albert saman við konu síni Frances*

Bretska hersetingin 1940-1945 er ein minnilig tíð í føroysku søguni. Hetta kemur ikki minst orsakað av tí sambandi, sum var millum hesar hermenn og føroyskar kvinnur. Í mongum førum endaði hetta við hjúnarlagi, har flestu kvinnurnar fluttu við monnunum til Bretlands. Hjá nógvum av hesum kvinnum riggaði hetta væl. Í Miðvikuni hava vit kunnað lýst eitt av hesum hjúnum, Jóhonnu f. Apol og Harry Wilson, sum júst hava havt diamantbrúðleyp.

Hjá øðrum endaði hetta samband við, at kvinnan sat eftir einsamøll við einum barni. Júst hesi børn hava sína serligu søgu, sum rættuliga nógv hevur verið frammi seinastu árini. Heilt náttúrliga hava hesi børn, sum frá líður, fingið eina trongd til at kenna teirra fedranna upphav, og fleiri teirra hava eisini gjørt nakað við tað. Tað er kanska ikki í øllum førum, at hetta hevur gingið eftir vild. Men fleiri frásagnir hava verið alment frammi um, hvussu væl hetta hevur eydnast, og hvussu familjur hava verið sameindar tvørtur um landamark. Eitt gott dømi um hetta sæst í sjónvarpssendingini um Robert McBirnie fyri kortum. Eitt annað dømi, sum hevur verið frammi, er Hervør í Bø. Samanumtikið kann sigast, at hesi børn hava ríkað okkara samfelag á mongum økjum.

Hetta er serliga hugaligt, tá hugsað verður um, at hesi børn hava ikki bert havt tað stuttligt vegna sína serstøðu. Fólk hava ikki altíð verið so tollynt á hesum økinum, sum tey eru í dag. Ofta gekk hetta útyvir tey avgjørt óseku, nevniliga børnini.

## Mamma Frank sá pápan verða bumbaðan

Sum við so nógvum øðrum hava hesi børn ymiskar søgur. Ein er tann hjá Frank Davidsen úr Sørvági. Tey eru nógv, sum kenna Frank. Partvíst er tað sum tann altíð blíði tollarin á flogvøllinum í nógv ár, og partvíst er kendur sum virkin í politikki. Hann var í fremstu røð í javnaðarflokkinum í mong ár, og hann var eisini eitt skeið tingmaður fyri Vága valdømi. Hann var heitur talsmaður fyri tey veiku í samfelagnum, og hetta var ikki uttan grund.

Men tey eru færri sum vita, at Frank eisini er ein partur av hesum parti av okkara hersetingarsøgu frá seinna heimsbardaga. Hann er nevniliga sonur skiparan á Lincoln City, bretska armeraða trolaran, sum varð bumbaður á Havnarvág 20. februar í 1941. Tey eru sjálvsagt færri og færri, sum minnast hetta, men hon er ein av teimum skakandi hendingunum frá hesi tíðini, sum er komin í okkara bardagasøgu.

Søgan byrjar, sum rímiligt er, við mammu Frank. Hon var úr Sørvági og æt Sunneva Atlanta Davidsen. Hon var dóttir Dánjal (Dáva Dánjal) og Atu, sum var úr Bø.

Sunneva tænti hjá Magnus Samuelsen í Havn um hesa tíð, tá henda søgan byrjar.

Tá vóru nógvir bretar í Føroyum og ikki minst í Havn. Sunneva kom tá at halda saman við Francis Albert Seward, sum var skipari á Lincoln City, ein trolari sum var tikin til krígstænastu. Hann var komin til Føroya í september 1940.

Sunneva gjørdist við barn, og beint eftir sá hon í kamarsvindeyganum hjá sær skipið hjá komandi pápanum verða bumbað av týskum flogfari, og átta mans vórðu dripnir. Hetta má hava verið ein ógvuslig uppliving hjá hesi ungu kvinnu.

Hetta gjørdist eisini endin á teirra sambandi. Beint aftaná hesa hending fór tann yvirlivandi manningin